# Súkkla í donsku fjøllunum



**Tað ljóðar sum skemt, men tað ber altso til at fara á fjallasúkkling í Jútlandi. Men við Rold Skov gevst hesin møguleikin – og møguleikin at vinna eina mounatainbike.**

Tey sum kortini hava hug at royna fjallasúkkling á flatlondum, fáa eina uppliving av teimum sjáldsomu her í Rold Skov, nakað sunnanfyri Aalborg.

Fyri tiltakinum stendur Jørn Dahl Sørensen, ið rekur Rold Skov Cykler, og hann er trygdin fyri eini spennandi súkklitúri á súkklum, ið eru gjørdar til júst hetta endamálið.

Í Rold Skov er løgd ein 22 kilometrar long ruta undir skiftandi umstøður og hæddum, men til ber sjálvandi eisini at taka ein styttri túr, um ein heldur ynskir tað.

Tað er sjálvandi munur á at súkkla á eini gongubreyt og í einum skógi, ikki minst tá ein skal bremsa og steðga. Men undir kønari leiðslu av roynda súkklaranum ber væl til, sjálvt hjá teimum óroyndu at fylgja við.

Eftir túrin kunnu fólk bara staðfesta, at tey hava havt eina serstaka uppliving, sum er lagað til teirra førleikar og orku.

Fyri tey, ið hava yvirskot av orku og stríðsvilja, eiga at merkja sær leygardagin 25. juni. Tá verður nevniliga kappingin "12 timer i Rold".

Her ber til at kappsúkkla ímóti ella saman við starvsfelagum, vinum ella familjuni, tí lagt er upp til at øll kunnu luttaka í fýra teimum ymisku flokkunum.

Vinningur er til tey fremstu, eins og við lutakasti, her møguleiki er at vinna tvær nýggjar mountainbikes.

Meiri fæst at vita um hetta á heimasíðuni www.12timerirold.dk.

## FLATLOND

*Danmark verður av mongum nevnt Flatlond, men hóast henda veruleika ber til at fara á fjallasúkkling, m.a. her í Rold Skov*

